**Frá nevndini, sum ger uppskot til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina**

Nevndin, sum ger uppskot til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina, hevði fýra formligar fundir í 2008. Harumframt var samskifti umvegis teldupost og telefon. Í mars varð endalig avgerð tikin um at skjóta upp yrkingasavnið ”Rot” (2007) eftir Tórodd Poulsen til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina í 2009. Í samráð við yrkjaran varð Anna Mattsson úr Svøríki biðin um at týða. Týðingin var klár í november. Sum vanligt tók Føroya Prent sær av prentingini, og beint fyri jól varð yrkingasavnið sent út til limirnar í norðurlendsku bókmentanevndini at taka støðu til. Frammanundan, t.v.s. beint fyri 1. desember, varð grundgeving fyri uppskotinum send Norðurlandadaráðnum (http://www.norden.org/nr/pris/lit_pris/2009/sk/Toroddur%20Poulsen.asp .).

Nevndin hevur longu havt tveir formligar fundir í 2009. Í Føroyum má altíð støða takast til uppskot rættiliga tíðliga á árinum, tí verkini í uppskoti skulu týðast.

Vinaliga

Bergur Djurhuus Hansen
formaður